# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## FØÐINGAR

8. februar fingu Helena Gaar dog Leif Bjarning, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. og vigaði 3260 gr.



6. mars fingu Lív Danielsen, Strendur og Vinjard Dam, Streymnes, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3350 gr.

7. mars fingu Joan og Hans Chr. Øregaard, Klaksvík, ein son. Hann var 40 cm. og vigaði 1220 gr.

7. mars fingu Annika Thorsvig og Eyðun Thorsvig, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. og vigaði 3000 gr.

8. mars fingu Heidi Bjerregaard Jensen og Eyðun Niclasen, Billund, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 4350 gr.

8. mars fingu Óluva og Eyðbjartur Danielsen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 4400 gr.

9. mars fingu Agata og Tom Sørensen, Streymnes, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3250 gr.

9. mars fingu Súsanna Funding og Rúni Juul, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3750 gr.

12. mars fingu Marianna Hoydal og Erlendur Joensen-Næs, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 3550 gr.

12. mars fingu Anita Johansen og Olivar Danielsen, Signabøur, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3660 gr.

13. mars fingu Heidi S. Haraldsen, Sandavágur og Bjarni Prior, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 55 cm.og vigaði 3725 gr.

13. mars fingu Anja Hovgaard og Andrass Petersen, Argir, ein son. Hann var 50 cm. og vigaði 3200 gr.

13. mars fingu Rannvá Troest og Kenneth Rasmussen, Saltangará, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 4250 gr.



Her situr Sára, sum er 4 ár, við lítlabeiggjanum, sum bleiv føddur 1. mars 2003. Hann var 52 cm. og vigaði 3820 gr. Foreldur teirra eita Elsbeth Joensen og Jóannes Jacobsen og tey búgva á Amager

## ANDLÁT

**07. mars**
Gudrun Lave, í Froðba, 90 ár
Brynjolf Joensen á Oyrabakka, 71 ár

**08. mars**
Óli Ellingsgaard av Eiði, 88 ár
Sofía Helena Bærentsen, vanliga nevnd Fíelena, í Vestmanna, 70 ár
Óli Ellingsgaard av Eiði, 88 ár

**09. mars**
Anna Simonsen, fyrr Follend, Havn, 84 ár

**10. mars**
Annefía Frederiksen, á Dalbø í Miðvági, 91 ár

## Mendelssohn um vikuskiftið

Í dag og í morgin verður eitt av tónleikasøgunnar gitnasu verkum fyri kór, solistar og orkestur, »Elias«, hjá Mendelssohn at hoyra í Fuglafirði og í Havn. Konsert verður í Fuglafjarðar kirkju í dag kl 17 og í Norðurlandahúsinum í Havn í morgin kl 16.

Her eitt sindur um solistarnar:



### Steen Lindholm

er útbúgvin á Det Kgl. Danske Musikkonservatorium í Keypmannahavn sum dirigentur og sum organistur. 1969-81 undirvísti hann sum docentur á Vestjysk Musikkonservatorium í Esbjerg. 1986-90 hevði hann við heitinum Korsyngemester leiðsluna av Det Kgl. Operakor á kongaliga teatrinum.

Síðan 1992 afturvendandi gestadirigentur hjá hollendska radiokórinum Groot Omroepkoor í Hilversum. Free lance dirigentvirksemi við donskum landspartaorkestrum og Radiounderholdningsorkestret, Radiokammerkoret umframt ORF-Chor, Wien, Mitteldeutscher Rundfunkchor, Leipzig, ungverska útvarpskórinum og á altjóða kórstevnunum Europa Cantat.

Síðan 1971 hevur Steen Lindholm stjórnað Koncertforeningens Kor og frá 1992 hevur hann verið fyrstileiðari hjá Det Danske Drengekor. Hann hevur stjórnað konsertum um mesta partin av heiminum og leitt verkskeið og seminar t.d. í Canada, USA, Kina og Korea; men Norðurlond hava altíð átt fremsta plássið í hansara hjarta og í hansara virksemi. Soleiðis var Steen Lindholm listarligur leiðari á Nordklang-stevnunum 1083-1998 og hevur stjórnað og spælt í øllum norðanlondum, ikki minst í Føroyum og í Íslandi. Tvær Grønlands-ferðir hava eisini verið.

Seinastu 20 árini hevur Steen Lindholm vitjað Føroyar einar 35 ferðir, hildið skeið, verið høvudsleiðari á kórstevnum og ferðast við ymsum donskum ljómliðum, m.a. Koncertforeningens Kor, Det Danske Drengekor og tí professionella manskórinum De Kongelige Svende og Københavns Kammerensemble.



### Berghild Poulsen

hevur lærarauprógv frá Føroya Læraraskúla við tónleiki sum linjugrein. Tíðliga gav hon til sjóndar sínar sertsøku songgávur. Hon hevur sungið nógv í kóri og tey seinastu mongu árini í Havnarkórinum. Í hesum umhvørvi kom hon í samband við úrvaldar sanglærarar sum André Orlowitz úr Póllandi og gitnu íslendsku operusangarinnuna Ólöf Kolbrún Harðardóttir. Í kórsins framførslum av størri verkum sum t.d. Skapanini eftir Haydn, Händels Messias og Ein deutsches Requiem eftir Johs. Brahms hevur Berghild Poulsen við sínari ljómandi, kenslubornu rødd ikki smæst burtur undir liðini á úrvaldum solistum uttan úr heimi.

Ofta eru boð eftir Berghild til solouppgávur hjá øðrum ljómliðum eisini, og eitt serligt tilknýti hevur hon havt til Tórshavnar Kamartrio.

Í des. 2002 kom hennara fyrsta fløga út.



### Elsa Súsanna Dalsgaard

tók diplomprógv í sangi á Det kgl. danske Musikkonservatorium í Keypmannahavn. Sanglærarar hennara vóru John Gutman og Anne Nyborg.

Í Danmark starvaðist hon sum professionellur sangari í Radiokoret, Det kgl. Operakor og í Jysk Operakor. Síðan 2000 hevur hon havt fast starv í Den norske Operas Kor í Oslo.

Elsa Súsanna hevur havt solokonsertir ymsa staðni í Danmark, og hennara ljómandi rødd hevur eisini verið at hoyra á solokonsertum í Føroyum eitt nú í sambandi við Summartónar. Tá Havnarkórið til sínar oratoriiframførslur hevur havt tørv á alt-sangara, hevur tað verið sum ein sjálvfylgja at heita á Elsu Súsonnu – soleiðis eisini til framførsluna av Händels Messias fyri seinastu jól.

Í ár er Elsa Súsanna Dalsgaard solistur í operunum Rigoletto og La Traviata eftir Verdi á Den norske Opera.



### Garðar Þór Cortes

byrjaði sína sangútbúgving á Sangskúlanum í Reykjavík í 1993, hevði Ólöf Kolbrún Hardardóttir til lærara og tók prógv eftir fýra árum. Hann helt fram á Hochschule für darstellende Kunst und Musik í Wien, og hevur seinni fingið undirvísing hjá André Orlowitz í Keypmannahavn. Hann hevur eisini gingið fingið útbúgvig á operudeildini á the Royal Academy of Music í London.

Garðar Þór Cortes hevur havt leiklutir í musicals, oratorium og operum og luttikið sum solostur á konsertum í Íslandi, Danmørk, Ungarn, Italia og Onglandi.

### Michael W. Hansen

sum við stuttum skotbrá syngur týðandi basspartin í "Eliasi" í staðin fyri Trygve Bjerkø, ið mátti geva avboð vegna sjúku, hevur fast starv sum sangari í fremsta professionella sangbólkinum í Danmark Radiokammerkoret. Harumframt hevur hann drúgva klassiska yrkisleið sum solistur í verkum sum t.d. Händels Messias, passiónum J.S. Bachs, Requiem Mozarts og mongum øðrum, eins og hann mangan hevur havt solistiskan leiklut á hósdagskonsertum danska útvarpsins.

## 3. Tulipantiltakið

GÓÐGERÐ
*Lions Club*

3. árið á rað skipar Lions Club Tórshavn fyri tulipantiltakinum.

Endamálið við tiltakinum er umframt at savna inn pening til góðgerandi endamál, eisini tað at seta fokus á vandamálið við ovurnýtslu av rúsandi evnum.

Í hesum døgum seta limir felagsins seg í samband við stovnar og fyritøkur í Havnini við áheitan á tey um at keypa tulipantyssi. Eitt slíkt tyssi kostar kr. 250,-, og í viku 15 verða tulipanirnar so bornar keyparunum saman við einum skelti við áskriftini "Nei til narko". Ætlanin er, at tulipanirnar saman við skeltinum skulu standa á einum sjónligum stað alla ta vikuna.

Narko er eisini eitt vandamál í Føroyum, og Lions Club metir tað tí vera neyðugt regluliga at venda eygunum móti hesum sníkjandi vandanum í samfelagnum!



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



### Eli Smith í Ribarhúsi

Í morgin, sunnudagin 16. mars kl. 15.30, letur Eli Smith listamaður upp listaframsýning í Ribarhús í Fuglafirði. Tá framsýningin letur upp, kemur dreingjakórið Undir Brúnni í Havn at syngja. Kórið er m.a.samansett av dreingjum sum búgva í grannalagnum hjá Britu og Eli Smith í Havn. Við á framsýningini hevur Eli vatnlitsmyndir og oljumálningar. Framsýningin verður opin til fyrst í apríl. Opið verður vanligar dagar, tá handilin í Ribarhúsi er opin. Leygardag og sunnudag verður opið millum kl. 15.30 og 17.30. Eli er útbúgvnin radiomekanikari. Hann undirvísir í máling og tekning á Føroya Fólkaháskúla.



### Jørgen Ladefoged deyður

Hósdagin 6. mars andaðist danski nýralæknin Jørgen Ladefoged, 69 ára gamal. Jørgen hevur síðan 1969 arbeitt á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn. Í 1971 bleiv hann serlækni í nýrasjúkum og hevur verið yvirlækni síðan 1973. Hann er kendur av øllum nýrasjúklingum í Føroyum. Í staðin fyri at nýrasjúklingar vórðu sendir til Danmarkar til viðgerðar, hevur Jørgen síðan 1994 ferðast hendan vegin 2-3 ferðir árliga.

### Brúdleyp

Í dag, kl. 16.30 giftast í Christianskirkjuni Margretha Torleifsdóttir Sigurðsson, Klaksvík og Eyðstein Sørensen, av Viðareiði. Brúdleypsadr.: Skálin.

Í dag giftast í Christianskirkjuni Kára Guðjónsson og Páll Olsen, bæði úr Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður á Tekniska skúla kl. 20.00.

### Maja í Túni 85 ár

Mánadagin 17. mars verður Maren Elisabeth ella Maja í Túni 85 ár. Hon er ættað úr Havnini, og nú býr hon aftur í Havnini. Men størsta partin av lívinum hevur Maja búð á Toftum.

Maja er dóttir Jóhonnu og Jens Christian Guttesen á Tinghúsvegnum í Havn. Hon var ættað úr Skálavík, og hann var havnarmaður. Maja og tey vóru ellivu systkin: Jens, Maja, Óli Jógvan, Gunhild, Kirsten, Petur, Leivur, Brynhild, Erling, Ingrid og Gunnar.

Jens, Óli Jógvan, Gunhild og Leivur eru farin. Erling býr í Albertslund, og hini búgva í Havnini.

Maja giftist 9. januar í 1943 við Júst í Túni á Toftum. Tey giftust inn hjá Pidda Skaale. Hann hevði verið giftur við Betty, systir Júst. Men hann var nýliga vorðin einkjumaður og sat eftir við tveimum smágentum. Maja og Júst búðu hjá Pidda í níggju ár. So fluttu tey í síni egnu hús í Toftatúni, og har búðu tey, inntil tey á heysti í 1987 fluttu í kjallaran hjá dóttrini og versoninum í Krosslíð í Havnini at búgva. Júst, ið var kendur skipari og vinnuligur undangongumaður, doyði 5. august í 1995.

Maja og Júst eiga átta børn: Andrias, Alma, Hanna, Kristian, Petur, Sanna, Símin og Marjun. Alma og Hanna búgva í Havnini, og hini seks eru á Toftum.

Sum ung genta tænti Maja m. a. hjá Heinesen og Christiani Holm. Eftir at hon var gift, var hon, sum nógv tær flestu húsmøðurnar miðskeiðis í hini øldini vóru tað, heimaarbeiðandi, og tað var nóg mikið at takast við. Børnini vóru tøtt, og heimið var eyðkent av stórum gestablídni og nógvum vitjanum.

Tá ið øll børnini vóru undankomin, var Maja á Nyki í nøkur ár, og har dámdi henni væl at vera saman við øðrum toftakonum.



Guttesen fólkini duga væl at syngja og spæla uppá. Øll systkini hava í síni tíð sungið í sangkórinum í Ebenezer, og eftir at hon var komin til Toftir, var Maja hollur sangstuðul í salinum, har hennara andaliga heim var, og har hon altíð møtti, tá ið nakað var á skránni.

Eitt stórt ár eftir at Maja og Júst vóru flutt til Havnar at búgva, fekk hon eitt strik, sum hevði við sær, at hon gjørdist lamin í aðrari síðuni. Hóast tað síðani ikki hevur verið so lætt at ferðast og vitjað, sum tað var frammanundan, so hevur Maja ikki ligið á løtu síðuni. Við góðari hjálp frá teimum næstu er hon við í eldratiltøkum í Ebenezer, hon er í august á hvørjum ári á eldralegu í Zarepta, og so vitjar hon børnini og barnabørnini, sum eru 29 í tali. Maja er langomma at átta børnum.

85 ára føðingardagin heldur Maja á Toftum, har tað í morgin frá kl. 17 verður opið hús í ítróttarhúsinum á Svangaskarði.

### Navnið á degnum

15. mars. Sakarias, deyður í 752. Grikki valdur til páva í 741. Hebráiskt navn, ið merkir: *Gud hevur minst til mín.* Dagarnir 15. til 21. mars vórðu nevndir gandadagarnir. Teir vóru sera óálítandi til veður.

16. mars. Gudmundur, deyður í 1237. Biskupur á Hólum í Íslandi. Fyri undirgerðir, sum hendu við grøv hansara, varð hann skírdur halgimenni. Norrønt navn, ið merkir Gud og verndari.

17. mars. Geirtrúð, deyð í 659. Dóttir Pippin eldra og abbasystir Karlamagnus. Fór ung í kleystrið Nivelles í Belgiu og gjørdist eisini abbadissa har. Millum annað var hon verndari hjá ferðandi fólki, og við vegirnar nógvastaðni í Evropa vórðu bygd sanktugeirtrúðtilhald, har tey ferðandi og tey fátæku kundu fáa hjálp. Við hesi tilhald vórðu sett upp vakurt málaðar træmyndir av Sanktu Geirtrúð við gyltari krúnu. Av veðri og vindi fóru málingin og gyllingin av hesum myndum, og av tí kemur tiltakið, at *ljómin er farin av Sankta Geirtrúð*. Undir hesum býr kanska eisini tað, at teir gomlu søgdu, at var regn geirtrúðardag, fór at vera regnsummar. Navnið er týskt, samansett av orðunum *spjót* og *styrki*.

Opið er leygardagin 15. mars frá kl. 10 til 17
við nógvum góðum brúktum bilum.
Landsins lagaligasta brúktbilafígging við 20% útgjald, og restina tosa vit um.
Bilfríðkan
við Velbastaðvegin
WWW.bilfridkan.fo
Tlf 317300 - Fartelefonir 217300 & 211662 - 100 Tórshavn